# ítróttur

Nr. 33 • leygardagur • 16. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fult vikuskifti

**Eftir at nógvar flytingar hava órógvað hondbóltskappingina seinastu vikuskiftini, verður aftur fult umfar hetta vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Seks hondbóltsdystir eru á skránni hetta vikuskiftið, og tað er í øllum førum nakað síðani, at hetta var galdandi seinast.



*Vinnarin av dystinum millum Neistan og VB sunnudagin, fer at hava góðar møguleikar at tryggja sær silvurmerkini í kvinnukappingini*

### Bjarging í eygsjón

Kanska mest spennandi uppgerðin um vikuskiftið verður á Giljanesi leygardagin, har Sóljan og STÍF hittast. Eftir at hesi bæði liðini fyri tað mesta hava stríðst um, hvør skal sleppa av niðasta plássinum, so er støðan nú tann, at tey bæði eru framman fyri Kyndil.

Tí kann dysturin hesa ferð gerast bjargingin hjá vinnandi liðnum, sum veruliga kann leggja frástøðu niður til botnin, og megnar annað av liðunum hetta, kann talan í roynd og veru verða um dystin, sum bjargaði árinum.

Í Havn fær Neistin vitjan av VB, og eisini her er spenningurin stórur. Eftir at bæði liðini fyri tað mesta hava stríðst um bronsumerki í ár, so setti VB seinasta vikuskifti hol á silvurstríðið, tá tær á útivølli megnaðu at vinna á Stjørnuni.

Júst tann sigurin ger, at vinnarin av hesum dystinum brádliga stendur við silvurmerkjunum í hondini. Bæði eiga tey heimadyst móti Stjørnuni til góðar, og gevur tann dysturin eisini fulla úrtøku, verður tað vinnarin á Hálsi sunnudagin, sum kann rópa seg fyri silvurvinnara, tá kappingin er lokin.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum verður í Klaksvík, har Stjørnan tekur ímóti Kyndli. Einki er at ivast í, at Stjørnan er risa stórur favorittur at vinna dystin. Eisini hóast liðið í løtuni ikki er so væl fyri, og skulu tey í Klaksvík framvegis droyma søtar silvurdreymar, so ein sigur móti Kyndli á heimavølli ein av avgjørdu fortreytunum.

### Ikki sami spenningur

Hjá monnunum verða somuleiðis tríggir dystir hetta vikuskiftið, tó at eingin teirra tykist hava sama avgerandi týdning sum hjá kvinnunum.

Í Vestmanna verður dystur millum KÍF og Kyndil leygardagin, og her fæst kanska at vita, júst hvussu langt teir í Kyndli eru komnir í royndunum at byggja sær liðið uppaftur. Ein sigur her kann veruliga staðfesta, at Kyndil so als ikki er nakað botnlið, meðan kollfirðingar hinvegin stríðast fyri at sannføra um, at tað eru teir heldur ikki, so útlitini fyri spenningi eru í øllum førum góð.

Tað kunnu tey ikki sigast at vera í Havn, har Neistin og H71 hittast. Í grundspælinum vóru hoyvíkingar annars millum fáu liðini, sum kundu geva oddinum mótstøðu, men síðani hevur snøgt sagt einki borið til. Enn hava teir ikki vunnið dyst í endaspælinum, og sannlíkindini fyri, at hetta skal henda móti Neistanum, mugu sigast at vera sera lítil.

Seinasti dysturin verður í Runavík, har VÍF kemur á vitjan. Tjaldur hevur í ár staðfest, at liðið ikki longur er at meta sum sjálvsagdur botnproppur, og eitt skifti var líkt til, at teir ætlaðu sær heiðursmerki, men ímóti komandi meistarunum úr VÍF er helst einki at ivast í, at teir verða við undirlutan.

## Dystir hetta vikuskiftið

**Hondbóltur**

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 16.02 | 16.00 | Sóljan-StÍF |
| 17.02 | 14.30 | Neistin-VB |
| 17.02 | 14.30 | Stjørnan-Kyndil |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 16.02 | 16.00 | KÍF-Kyndil |
| 17.02 | 16.00 | Neistin-H71 |
| 17.02 | 16.00 | VÍF-Tjaldur |

**Flogbóltur**

**Steypafinala kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 16.02 | 14.30 | TB-Mjølnir |

**Steypafinala menn**

| | | |
|---|---|---|
| 16.02 | 16.30 | SÍ-ÍF |

# Nógvir ætla sær nevndarsess

**Meðan formansvalið í Fótbóltssambandinu m nú er ein avgreiðsluspurningur, tykist áhugin fyri nevndarsessinum at vera stórur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum vit skrivaðu í hósdagsútgávu okkara, so verður bert talan um tað eina valevnið, tá FSF um eina viku fer at hava aðalfund. Dánjal Andreasen varð fyri einum mánaði síðani skotin upp av nevndini hjá FSF, og hóast dúgliga hevur verið tosað um onnur valevnið, so er veruleikin tann, at leirvíkingurin er einasta valevnið, og tískil longu kann fara undir at fyrireika seg til nýggja sessin.

### Nógvir um boðið

Er formansvalið ein avgreiðsluspurningur, so tykist spenningurin um nevndarvalið at vera munandi størri.

Fyri vali standa Jákup Simonsen og Karl Vidtfeldt, og ikki færri enn seks valevnið er stillaði upp til hesar báðar sessirnar. Umframt teir báðar, Jákup og Karl, so er talan um Christian Andreasen úr Havn, Sveinbjørn Danielsen úr Hvalba, Rúna Heinesen úr Klaksvík og Mortan Poulsen úr Havn. Hesin seinast nevndi er varalimur í nevndini hjá FSF, og í løtuni røkir hann sessin hjá Óla Holm, sum noyddist at siga sessin frá sær, tá hann gjørdist landsstýrismaður. Eisini Sveinbjørn Danielsen er í løtuni varalimur í nevndini.

Grundað á undirtøkuna, sum Christian Andreasen tóktist hava sum formansvalevni, so er lítið at ivast í, at hann kann fáa hópin av atkvøðum til nevndarvalið, og so er spurningurin, hvussu kappingin um næsta sessin fer at verða. Eisini kann triði sessurin gerast rættiliga spennandi, tí sum sagt er Óli Holm í løtuni í farloyvi, og tað kann ikki útilokast, at hann framhaldandi er landsstýrismaður eftir komandi løgtingsval. Tí kann ein varasessur eins væl gerast ein fastur sessur í nevndini hjá Fótbóltssambandinum komandi árið.

Eftir at aðalfundurin er av, umleið kl. 13.00, fer Fótbóltssambandið so eisini at sýna fráfarandi formanninum tann heiður, at skipa fyri almennari móttøku. Frá FSF verður sagt, at hetta kann ikki metast sum annað enn náttúrligt eftir alt tað arbeiði, sum Torleif hevur gjørt fyri føroyskan fótbólt seinnu mongu árini, og hetta ætla teir sær soleiðis at takka fyri.



# Tvøráfólk gera innrás

**Hópur av tvøráfólki fer til Havnar at hyggja at steypafinaluni hjá kvinnunum, og venjarin hjá oddaliðnum er ikki í iva um, at hansara leikarar fara at geva hesum ein góðan dyst**

FLOGBÓLTSFINALA
*Jákup Mørk*



*Virgar Djurhuus, sum her sæst tosa við leikarar sínar, heldur, at tað kann verða ein fyrimunur hjá teimum, um talan verður um ein drúgvan dyst*

Fyri fyrstu ferð skal TB royna seg í steypafinalu í flogbólti, og hóast spenningurin á Tvøroyri sjálvsagt er stórur, so heldur venjarin hjá liðnum ikki, at hann fer at gera nakað serligt burtur úr at fyrireika sínar leikarar til stóra dystin.

- Nei. Tað fari eg so slettis ikki. Genturnar vita sjálvar, hvat er í væntu. Har verður alt varpað beinleiðis. Allir miðlar vera á staðnum, og rómurin verður helst øgiligur av áskoðarunum, tó at gangur er nakað sum tær eru vanar við, heldur Virgar Djurhuus, sum hevur vant liðið størsta partin av árinum.

- Eg fái sum so heldur ikki gjørt tað stóra við at venja nakað upplegg til dystin. Fýra av leikarunum eru dagliga norðanfjørs, so tað er ógvuliga trupult at venja nakað ítøkiligt taktiskt. Hetta er ein trupulleiki, sum vit hava havt í alt ár, men higartil hevur tað so gingið hampuliga væl, heldur hann, og vísir til trygga fyrsta plássið í kappingini.

### Royndir á muni

Hóast hann soleiðis tykist ógvuliga bjartskygdur, so hvørki kann ella royndir venjarin at snúgva sær undan, at tá ræður um ein finaludyst, so kunnu royndirnar hava nakað at siga, og dylir ikki fyri, at júst á hesum økinum eru tær úr Klaksvík nakað væl betri fyri.

- Akkurát har er stórur munur, men okkara eru ikki heilt grønar kortini. Hóast liðið er ungt, so er kortini bert talan um tríggjar av tíggju, sum í ár spæla í meistaradeildini fyri fyrstu ferð, og vit hava hóast alt eisini nakrar royndar leikarar, sigur Virgar. Ein hin royndasta hjá TB er annars Gudrid Nolsøe, sum kemur heim til hendan dystin, umframt at hon eisini fær seinastu dystirnar í landskappingini við, og einki er at ivast í, at hon ætlar sær at fáa tvey gullmerki burtur úr allari ferðingini.

Hóast munin í royndum, so heldur venjarin hinvegin, at tað kann verða ein fyrimunur hjá TB, at hópurin í miðal er væl yngri. Í øllum førum, tá vit spyrja, hvussu spæliætlanin hjá teimum verður.

- Alt ár hava vit roynt at lagt dentin á álopsspælið, og tað verður so eisini galdandi hesaferð. Vit skulu royna at leggja trýst á alla tíðina, og gera vit tað, so rokni eg við, at tað eigur at koma okkum til góðar, um talan verður um ein drúgvan dyst. Tær eru jú ikki heilt ungar longur, sigur hann skemtandi um Mjølnir-liðið.

### Øgiligur áhugi

Tá spurt verður um, hvussu áhugin er fyri dystinum, er svarið beinanvegin, at hann er øgiligur.

- Áhugin er heilt stórur. Tað er einki at ivast í. Tú merkir tað týðiligt, bara tú gongur úti. Fólk eru óføra at fregnast. Vita hvussu stendur til við liðnum og soleiðis, so er óføra stuttligt.

- Vit vænta eisini heilt fitt av áskoðarum. Ein listi hevur verið frammi, har fólk kunnu tekna seg til ferðina til Havnar, og seinast eg visti, høvdu eini 50 fólk teknað seg. Harafturat koma so tvøráfólk, búsitandi í Havn, so alt í alt verður helst talan um heilt nógvar áskoðarar, og vit ætla so at gera alt tað, sum vit kunna, fyri at geva teimum ein góðan dyst, sigur venjarin hjá TB at enda.

## Eitt sindur um liðini

| | TB | - | Mjølnir |
|---|---|---|---|
| Miðalhædd | 172,4 cm | - | 167,8 cm |
| Lægsti leikari | 160 cm | - | 160 cm |
| Hægsti leikari | 180 cm | - | 180 cm |
| Landsdystir í miðal | 4,3 | - | 12,5 |
| Flestar landsdystir | 21 | - | 92 |
| Miðalaldur | 20,3 ár | - | 23,8 ár |
| Elsti leikari | 27 ár | - | 39 ár |
| Yngsti leikari | 17 ár | - | 17 ár |

# Ikki favorittar

**Tað er sjáldan, at so er, men hesa ferð fara kvinnurnar hjá Mjølni inn á vøllin, vitandi um at tær ikki eru favorittar, men tær leggja ikki minni í dystin av teirri orsøk**

FLOGBÓLTSFINALUR
*Jákup Mørk*

- Vit eru allar so hampuliga væl fyri, og tað er einki at ivast í, at vit ætla okkum at vinna dystin.

Somikið avgjørd er Anna Müller Jacobsen, tá vit undan steypafinaluni royna at fregnast, hvussu tær í Mjølni hava fyrireikað seg til steypafinaluna, sum verður leikt í dag.

### Ikki favorittar

Hungurin eftir einum sigri gerst so avgjørt ikki minni av, at hetta er møguleikin hjá sigursvanda Mjølni at fáa nakað burtur úr árinum.

- Tað sigur seg sjálvt, at vit nú vilja hevna eitt sindur av tí, sum vit hava mist í landskappingini, men eg haldi ikki, at vit eru favorittar fyri tað. Vit hava leikt tríggjar ferðir móti TB í landskappingini, og tvær ferðir hava vit tapt, so skal nakar vera favorittur, so mugu tað verða tær, heldur Anna.

### Royndir sum barlast

Aðra staðni á síðuni vísir venjarin hjá TB á, at hvat viðvíkur royndum, so er Mjølnir frammanfyri, og Anna heldur eisini, at hetta kann gerast ein fyrimunur hjá teimum.

- Tað hevur so avgjørt nógv at siga, at vit hava roynt hetta áður. Tú kanst siga, at vit eru vanar við at spæla slíkar dystir, og tær royndirnar eiga so avgjørt at koma okkum til góðar. Og so fáa vit eisini Tove Rygsfjord upp til dystin, so alt í alt skuldi liðið verið sterkt, sum tað kann vera.

Tosið um royndirnar leiðir okkum eisini til dystin í fjør, tá Mjølnir vendi 0-2 til 3-2. Spurd, um ikki hetta var júst eitt úrslit av drúgvu royndunum á liðnum, heldur Anna, at tað kann so væl vera.

- Tað ferðina gekk alt av skriðuni til fyrstu løtuna, men vit góvust ikki av teirri orsøk. Nú vóni eg sjálvandi ikki, at tað sama hendir hesaferð, men vit missa ikki mótið, hóast dysturin kanska byrjar illa.



*Í Mjølni vóna tey, at drúgvi royndirnar hjá fleiri av leikarunum fara at verða avgerandi í finaludystinum*

### Áskoðarar hjálpa

Vanliga hava ítróttalið úr Klaksvík eina trúgva áskoðarafjøld, og í so máta er Mjølnir einki undantak.

Anna dugir tó illa at meta um, hvussu verður við stuðlinum hesaferð.

- Eg vóni sjálvandi, at nógv koma við okkum. Tað verður í øllum førum skipað fyri busstúri, men seinast eg visti, høvdu ikki meira enn eini 25 teknað seg, men tað kann væl broytast kortini.

- Og so skalt tú ikki gloyma allar klaksvíkingarnar, sum eru í Havn. Tey plaga so sanniliga eisini at gera sítt. Til stuttleikar kann nevnast, at meðan tað ikki gekk so væl í finaluni í fjør, so var tað ein áskoðari, sum kom yvir og gav okkum ein ordans vals. Eg veit ikki, um tað bara var tí, men tað fekk okkum í øllum førum at vakna, so týdningurin av góðum áskoðarum eigur avgjørt ikki at undirmetast, sigur Anna Müller Jacobsen at enda.